# Lat tað gamla falla

## Gamli skúlin í Vestmanna, sum plagdi at verða brúktur sum ungdómshús, er tikin niður

*Birgir W. Høgnesen*
*Birgir@sosialurin.fo*
*Myndir: Hildbert Elison*

Vestmanna kommuna tók herfyri endaliga avgerð, um at gamli skúli nú skuldi takast niður.

Í 60unum 70unum og fram í 80'ini vóru húsini brúkt til ungdómshús, sum bleiv rópt Geilin.

Síðan Geilin stongdi, hava ymiskar ætlanir verið við húsinum, men hetta kom tó ongantíð longri, og nú helt kommunan at tíðin var komin til at taka húsini niður.




*J & K Petersen hevur her sett stóru maskinuna niðan á bakkan*



*...og einki er at bíða við skúlin fær sín fysta høgg*



*...eftir lítlari løtu er hálvur skúli burtur*



*... sunnari endi bíðar eftir síðsta nosinum*



*….. tað skal eitt høgg til afturat*



*... her liggur gamli skúli í Vestmanna anno 2007*